Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 25.11.2021 kl. 20:00 |
| **Málnr.:** | |
| Nevndarlimir: | Per Martin Gregersen<br>Hanna Jensen<br>Hjalti Dalheim<br>Katrin Kjartansdóttir<br>Magnus Skoralíð<br>Marjun Andreasardóttir<br>Rúni Justinussen<br>Marita Klein Joensen<br>Petur Súni Jacobsen |
| Varalimir: | |
| Ikki møtt: | |
| Nevndarskrivari: | Erik Lervig |
| | Hanna Jensen var bert við til viðgerðina av máli nr. 21/00392 |


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Mál til viðgerðar** | | | |
| 76/21 | 21/00198-1 | Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 21/00198 - Eldraráð í Eysturkommunu | 3 |
| 77/21 | 21/00433-3 | Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 21/00433 - Reglugerð fyri húsarhaldsdjór (flogfenað) í Eysturkommunu | 6 |
| 78/21 | 21/00344-7 | Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 21/00344 - Umsókn um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 199aa, SG. | 8 |
| 79/21 | 21/00419-2 | Fráfreiðing og tilmæli til mál nr. 21/00419 - Umsókn viðv.keyp av jørð/ uppíbygging á matr. nr. 35c Syðrugøtu | 9 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 80/21 | 21/00437-1 | Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 21/00437 - Umsókn um marknaumskipan millum matr. 90p og vegin litra l. NG | 10 |
| 81/21 | 21/00438-1 | Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 21/00338 - Sundurbýtið av matr. 72f. NG | 11 |
| 82/21 | 21/00440-1 | Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 21/00440 - Broyting av býarplaninum fyri Eysturkommunu – matr.88g og part av matr.72f í Norðragøtu | 12 |
| 83/21 | 21/00392-1 | Fíggjarætlan 2022 | 14 |
| 84/21 | 21/00457-1 | Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 21/00457 - Broyting av býarplaninum undir Gøtueiði – Havnarøkið | 16 |
| | | | |

**Mál til viðgerðar**

## 76/21 Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 21/00198 - Eldraráð í Eysturkommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Umhvørvis - og trivnaðarnevndin | 19.04.2021 | 14/21 | 21/00198-1 |
| 2 Umhvørvis - og trivnaðarnevndin | 20.05.2021 | 16/21 | 21/00198-1 |
| 3 Umhvørvis - og trivnaðarnevndin | 15.11.2021 | 34/21 | 21/00198-1 |
| 4 Býráðið | 25.11.2021 | 76/21 | 21/00198-1 |

**Málslýsing:**

Løgtingslóg nr. 19 frá 7. apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m., er ásett í § 6, stk. 2, at *"kommunurnar kunnu seta á stovn eldraráð í økinum, sum verða tikin við upp á ráð, tá avgerðir og umskipanir innan økið skulu fremjast".*

Tá nú Eysturkommuna er partur av Nánd, er hugsandi, at skynsamast er at skipa hetta eldraráð svarandi til tað økið, sum Nánd fevnir um og varðar av (Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu).

Umsitingin hevur kunnað leiðsluna í Nánd um ætlanirnar hjá Eysturkommunu. Leiðarin hjá Nánd heldur, at eitt komandi eldraráð gevur best meining og ger mest gagn, um hetta verður skipað millum og innan samstarvs kommunurnar í Nánd.

---

18. mai 2021

Í mun til samtyktina á seinasta fundi í Umhvørvis – og trivnaðarnevndini hevur umsitingin verið á fundi við leiðsluna í Nánd.

**Samstarvsráð og eldraráð:**

Samstarvsráð er umrøtt í Løgtingslóg nr. 19. frá 07. apríl um heimatænastu, eldrarøkt v.m. í grein 15 stendur fylgjandi:

> *§ 15. Á hvørjum røktarheimi og eldrasambýli verður valt eitt samstarvsráð, sum hevur til endamáls at tryggja samstarvið millum búfólk, avvarðandi og heimið.*
> *Stk. 2. Samstarvsráðið kann ráðgeva og vegleiða leiðsluni á røktarheiminum ella eldrasambýlinum og skipa fyri tiltøkum, sum kunnu gera gerandisdagin hjá búfólkunum meiri virknan bæði á heiminum og í nærumhvørvinum.*

*Stk. 3. Ráðið verður mannað við einum búfólki, einum umboði fyri avvarðandi og einum starvsfólki*
*Stk. 4. Samstarvsráðið skipar seg sjálvt, og ger innanhýsis starvsskipan.*

Hetta er nakað, sum Nánd hevur skyld at skipa smb. lóg, og er sostatt ikki nakað sum politiski myndugleikin tekur avgerð um.

Í mun til eldraráð stendur í somu lóg:

> *§ 6. Kommunurnar skulu tryggja, at borgarar í størst møguligan mun hava møguleika at verða hoyrdir, tá týðandi umskipanir, bygnaðarbroytingar o.t. verða framdar, sum hava ávirkan á tænastuna í økinum.*
> *Stk. 2. Kommunurnar kunnu seta á stovn eldraráð í økinum, sum verða tikin við upp á ráð, tá avgerðir og umskipanir innan økið skulu fremjast.*

Leiðslan í Nánd heldur, at tørvur er á einum eldraráð og at hetta verður skipað millum og innan samstarvskommunurnar í Nánd.
Eitt nú nevnir leiðslan í Nánd, at eitt nú eru demografisku avbjóðingarnar meira kompleksar nú enn fyrr og tí kann eitt eldraráð (umboðar brúkaran/eldru) verða góður hoyringspartnari í hesi avbjóðing

Eitt eldraráð kann koma við uppskotum, sum Nánd ikki dagligа umsitur – eitt nú:

- bústaðir
- einsemi
- reingerð

---

12. november 2021:

Umsitingin í Eysturkommunu hevur saman leiðaranum hjá Nánd og sosialdeildarleiðaranum í Fuglafjarðar kommunu (eldraráðið skipað millum og innan samstarvskommunurnar hjá Nánd) orða viðtøkur fyri einum komandi eldraráðið at taka støðu til.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Eingin peningur er avsettur á Fíggjarætlanini 2021 til endamálið

**Tilmæli**

Mælt verður til at trivnaðarleiðari í Eysturkommunu og leiðarin í Nánd arbeiða við at orða ein viðtøku fyri eitt komandi Eldraráð at leggja fyri Umhvørvis – og trivnaðarnevndina á fyrstkomandi fundi, sum er mánadagin, 17. mai 2021.

-----------------------------------------------------------------------------

12. november 2021

Mælt verður til at tikið verður undir við fyriliggjandi uppskoti til “Viðtøkur fyri eldraráðið í Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu – Nánd”.

**Umhvørvis - og trivnaðarnevndin 19. apríl 2021**
Samtykt at umsitingin kannar nærri um tørvin á einum eldraráðið og gera eina nærri lýsing av, hvat eitt eldraráð er og hvørjar uppgávur liggja hjá hesum ráðið.

**Umhvørvis - og trivnaðarnevndin 20. mai 2021**
Samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við málinum og kemur við einum uppskoti til viðtøkur v.m. at leggja fyri Umhvørvis – og tivnaðarnevndina.

**Umhvørvis - og trivnaðarnevndin 15. november 2021**
Mæla til at samtykkja viðtøkurnar við tí broyting at grein 4 í stk. 1 er soljóðandi: Íbúgvarnir í hvørji kommunu velja síni umboð í eldraráðið, har hvør kommuna fær eitt umboð pr 500 íbúgvar.

**Býráðið 25. november 2021**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

## 77/21 Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 21/00433 - Reglugerð fyri húsarhaldsdjór (flogfenað) í Eysturkommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Umhvørvis - og trivnaðarnevndin | 15.11.2021 | 35/21 | 21/00433-3 |
| 2 Býráðið | 25.11.2021 | 77/21 | 21/00433-3 |

**Málslýsing:**

Eysturkommuna hevur í ávísum førum fingið klagur og áheitanir um húsdýrahald og at hetta er ov illa skipað. Hetta hevur verið til ampa fyri grannar og eisini hevur kommunan fingið avbjóðingar við at rotta nørist í nærumhvørvinum.

Fyri at bøta um hetta og at virka fyri, at so lítil ampi stendst av húsdýrahaldi sum gjørligt, verður uppskot til reglugerð gjørd til støðutakan.

Sum útgangsstøði er uppskot til reglugerð tikið í "Kunngerð nr. 53 frá 03.05.1994 UM UMHVØRVISREGLUR:

*§ 23.* ***Húsdýrahald****. Í býum, býarlíkum bygdum og í meira býarlíkum býlingum kann bý- ella bygda(r)ráðið gera av, at húsdýrahald ikki er loyvt uttan góðkenning frá bý- ella bygda(r)ráðnum.*

*Stk. 2. Um so er, at húsdýrahald, sum ikki er umfatað av kap. 5 í løgtingslóg um umhvørisvernd, elvir til ampa, sum t.d. stink, gang, nógva flugu, nógva rottu, kann bý- ella bygda(r)ráðið geva boð um, at neyðug tiltøk skulu setast í verk til at fyribyrgja hesum, og í førum, tá ið ikki verður gjørt eftir boðunum, seta forboð fyri dýrahaldinum.*

*§ 26.* ***Nærri ásetingar****. Bý- ella bygda(r)ráðið kann áseta nærri reglur um bygging og reinhald av fjósum, stallum, seyða-, høsna- og dunnuhúsum, køstum, mykju-, súrhoyggja- og landbrunnum o.t. Bý- ella bygda(r)ráðið kann geva boð um neyðug tiltøk og steðga byggingum, um reglurnar ikki verða fylgdar.*

*§ 32. 1)* ***Góðkenning av kommunalum reglum****. Áðrenn tær kunnu fáa gildi, skal Umhvørvisstovan góðkenna reglur, sum bý- ella bygda(r)ráðið ásetur við heimild í hesi kunngerð.*

Um so er at reglugerðin verður samtykt, er ætlanin at ein kunning /faldari verður sendur út til øll húskir í kommununi, eins og kunning verður løgd á heimasíðuna

**Fíggjarligar avleiðingar:**

| |
|---|
| Ongar fíggjarligar avleiðingar útyvir, at kunning skal sendast út til borgarar í kommununi (møguliga við einum faldara). |

| Tilmæli |
|---|
| Mælt verður til at samtykkja fyriliggjandi reglugerð |

**Umhvørvis - og trivnaðarnevndin 15. november 2021**
Mæla til at samtykkja fyriliggjandi reglugerð

**Býráðið 25. november 2021**
Einmælt samtykt at taka undir við tlmælinum hjá umhvørvis - og trivnaðarnevndini.

## 78/21 Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 21/00344 - Umsókn um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 199aa, SG.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 18.11.2021 | 48/21 | 21/00344-7 |
| 2 Býráðið | 25.11.2021 | 78/21 | 21/00344-7 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið umsókn um loyvi at byggja nærri mark ímóti matrikkul nr. 199a í Syðrugøtu.<br><br>Talan er um eina altan, ið verður bygt nærri markinum. Økið frammanfyri húsini er fríøki. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar fíggjarligar avleiðingar |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður frá at ganga umsóknini á møti. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 18. november 2021**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at ganga umsókn um frávik á møti.

**Býráðið 25. november 2021**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi – og býarskipanarnevndini.

## 79/21 Fráfreiðing og tilmæli til mál nr. 21/00419 - Umsókn viðv.keyp av jørð/ uppíbygging á matr. nr. 35c Syðrugøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 18.11.2021 | 49/21 | 21/00419-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 22.11.2021 | 66/21 | 21/00419-2 |
| 3 Býráðið | 25.11.2021 | 79/21 | 21/00419-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið umsókn um keyp av lendi í Syðrugøtu.<br><br>Umsøkjari søkir um loyvi at keypa 75 fermetrar burturav matrikkul nr. 70 í Syðrugøtu.<br>Ætlanin er at gera parkering og byggja størri altan.<br><br>Økið liggur, sum øki F, almenn frítíðar- og mentanarøki í byggisamtyktini. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður frá at ganga umsóknini á møti. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 18. november 2021**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 22. november 2021**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 25. november 2021**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi – og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

## 80/21 Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 21/00437 - Umsókn um marknaumskipan millum matr. 90p og vegin litra l. NG

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 18.11.2021 | 50/21 | 21/00437-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 22.11.2021 | 67/21 | 21/00437-1 |
| 3 Býráðið | 25.11.2021 | 80/21 | 21/00437-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur ætlan at fremja marknaumskipan millum matrikkul nr. 90p og litra L. Í Norðragøtu.<br>Talan er um at marknaumskipa 924 fermetrar frá 90p til litra L. (Sí skjøl í málinum).<br><br>Matrikkul nr. 90p liggur í øki B1: Alternativ íbúðarbygging í almennu byggisamtyktini |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Sundurbýti kostar áleið 25.000 kr. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at marknaumskipa matrikkul nr. 90p og Litra L í Norðragøtu sambært tekning í málinum. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 18. november 2021**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 22. november 2021**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 25. november 2021**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi – og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

## 81/21 Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 21/00338 - Sundurbýtið av matr. 72f. NG

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 18.11.2021 | 51/21 | 21/00438-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 22.11.2021 | 68/21 | 21/00438-1 |
| 3 Býráðið | 25.11.2021 | 81/21 | 21/00438-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Í samband við sølu av matrikkul nr. 72f í Norðragøtu, er neyðugt at kommunan fremur sundurbýtið.<br><br>Talan er um jarðarlutin við Sjúrðargøtu , ið er ætlað til íbúðarbygging.<br><br>Øki er samla 19.972 m2 og skal øki til íbúðabyggingini sundurbýtast til ca. 6.700 m2.<br><br>Víst verður til ``mál. 21/00248 Tilmæli – Uppskot til íbúðarbygging matr.72f í Norðragøtu`` |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Sundyrbýti kostar áleið 25.000 kr. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at sundurbýta matrikkul nr. 72 sambært tekning í málinum. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 18. november 2021**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 22. november 2021**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 25. november 2021**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi – og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

## 82/21 Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 21/00440 - Broyting av býarplaninum fyri Eysturkommunu – matr.88g og part av matr.72f í Norðragøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 18.11.2021 | 52/21 | 21/00440-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 22.11.2021 | 69/21 | 21/00440-1 |
| 3 Býráðið | 25.11.2021 | 82/21 | 21/00440-1 |

**Málslýsing:**

Í tráð við íbúðarbygging í Norðragøtu við Sjúrðargøtu og partur av málinum 21/00248, mælir umsitingin til at broyta Býarplanin fyri Eysturkommunu í Norðragøtu: matr.86a, 88a og part av matr.72f og 88g.

Broyting í býarplaninum er fylgjandi:
Matr.86a, 88a, 88g og partur av 72f í Norðragøtu.

Lýsing verandi støða:

- Partur av matr.72f er B2-øki, F-øki
- Partur av matr.88g er F-øki
- Matr.86a er avset til B2-øki, B-øki og H-øki
- Matr. 88a er avset til B1-øki, B-øki og H-øki

Lýsing broytt støða:

- Partur av matr.72f verður broytt til B1-øki, ið samb. Almennu byggisamtyktini er kannað íbúðar- og húsabygging.
- Partur av matr.88g verður sum verðandi øki-F
- Matr.86a verður broytt til B1-øki, ið samb. Almennu byggisamtyktini er kannað íbúðar- og húsabygging.
- Matr.88a verður broytt til B1-øki, ið samb. Almennu byggisamtyktini er kannað íbúðar- og húsabygging.

Víst verður til skjøl í málinum.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Broytingin kostar áleið 30.000 kr.

**Tilmæli**

Mælt verður til at góðkenna uppskotið um at broyta býarplanin fyri Eyturkommunu í Norðragøtu samb. skjølum í málinum.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 18. november 2021**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 22. november 2021**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 25. november 2021**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi – og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

## 83/21 Fíggjarætlan 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 28.09.2021 | 57/21 | 21/00392-1 |
| 2 Býráðið | 30.09.2021 | 70/21 | 21/00392-1 |
| 3 Fíggjarnevnd | 22.11.2021 | 70/21 | 21/00392-1 |
| 4 Býráðið | 25.11.2021 | 83/21 | 21/00392-1 |

**Málslýsing:**

Víst verður til fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan frá fíggjarnevndini. Uppskotið er eisni viðgjørt í øllum teimum føstu nevndunum.

Ískoyti 22/11-21
Víst verður til uppskot frá felagsfundi um fíggjarætlan fyri 2022 tann 19/11-21.

Sambært fyriliggjandi uppskoti verða høvuðstølini í fíggjarætlanini fyri 2022 hesi:

| | |
|---|---|
| Inntøkur íalt | 118.226.000,00 |
| Rakstrarútreiðslur íalt | 98.186.000,00 |
| Rentuútreiðslur | 970.000,00 |
| Útreiðslur til rentustuðul | 1.400.000,00 |
| íløgur | 46.100.000,00 |
| RLÚ | -28.430.000,00 |
| Avdráttir | 7.500.000,00 |

Skattaprosentið veðrur 21, sum er tað sama sum í 2021, og barnafrádrátturin verður 8.000,00 kr. sum eisini er tað sama sum í 2021.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

**Fíggjarnevnd 28. september 2021**

Fíggjarnevndin mælir til at samtykkja ein rakstrarkarm og ein íløgukarm sambært fyriliggjandi uppskoti til fíggjarætlan fyri 2022. Rakstrarkarmurin verður 97,5 mió. kr. og íløgukarmurin verður 49 mió. kr.

**<u>Býráðið 30. september 2021</u>**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**<u>Fíggjarnevnd 22. november 2021</u>**
Fíggjarnevndin mælir til at samtykkja fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan.

**<u>Býráðið 25. november 2021</u>**
Einmælt samtykt at góðkenna fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan fyri 2022.

## 84/21 Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 21/00457 - Broyting av býarplaninum undir Gøtueiði – Havnarøkið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðið | 25.11.2021 | 84/21 | 21/00457-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Í samband við havnarøki undir Gøtueiði fram við Fjarðarvegin, mælir umsitingin til at broyta býarplanin fyri Eysturkommunu samb. skjølum í málinum.<br><br>Broytingar í býarplaninum er fylgjandi:<br>Matr.333, part av matr.333 og 334.<br><br>Lýsing verandi støða:<br>• Havnarøki liggur sum sýnt fram við strondini og niðan á jørðina við matr. 333,332 og 334.<br><br>Lýsing broytt støða:<br>• Býarplanurin er tillagaður á matr. 334 undir Gøtueiði, sum sýnt á kortskjali.<br>• Býarplanurin er tikin burtur útfyri matr. 333 undir Gøtueiði, sum sýnt á kortskjali<br>• Býarplanurin er tillagaður á matr. 332 undir Gøtueiði, sum sýnt á kortskjali. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Broytingin kostar áleið 25.000 kr. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at góðkenna uppskotið um at broyta býarplanin fyri Eysturkommunu undir Gøtueiði samb. skjølum í málinum. |

**Býráðið 25. november 2021**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

fundurin lokin kl. 21.30

______________________________

Per Martin Gregersen

______________________________

Hanna Jensen

______________________________

Hjalti Dalheim

______________________________

Katrin Kjartansdóttir

______________________________

Magnus Skoralíð

______________________________

Marjun Andreasardóttir

______________________________

Rúni Justinussen

______________________________

Marita Klein Joensen

______________________________

Petur Súni Jacobsen